*Lagt til rættis:*
*Inna Tørnroos*
*& Ragnhild Dam*
*Tilfar: H.N.J. Bókahandil*

# 10 tips til jóla

## 10 løtt hugskot til, hvussu tú kanst hugna um á jólum



1

### Frostað frukt

At brúka:
Frukt
Eggjahvíta
Sukur

Mannagongd:
Smyr eggjahvítan á fruktina og vend henni í sukri ella stroy tað omaná. Set fruktina at torna og legg hana pent í eina skál ella brúka hana í einari dekoratión.



2

### Sum í gomlum døgum

**At brúka**
**Brúnt pappír**
**Blað ella bók**
**Grovt band**
**Lakk**
**Stempul**
**Grann**

**Mannagongd:**
**Pakka gávuna inn í brúna pappírið. Skræð eitt petti úr blaðnum ella bókini og líma á pakkan. Bind band um. Smelta lakkið við at halda tað yvir logandi eldi og lat tað dryppa niður á pakkan og bandið. Stempla niðurí, meðan lakkið enn er flótandi og lat tað harðna. Pynta við granni.**



3

### Urtapottur við kanel

**At brúka:**
**Ein gamlan pott**
**Heil kanel**
**Band**

**Mannagongd:**
**Vaska og turka pottin. Sker kanelstengurnar til og líma tær á pottin við límpistóli. Lat torna og bind eitt fínt band um.**

### Turkaðar appilsinir

**At brúka:**
**Appilsinir**
**Køkspappír**
**Mikroovn**

**Mannagongd:**
**Sker appilsinina í skivur, sum tú leggur á eitt køkspappír. Set tað inn í mikroovnin at torna á tiðni-programminum. Tað tekur vanliga einar 15-20 minuttum, men ansa eftir, at tær ikki torna ov skjótt, tí so verða tær ov brúnar.**

4



5

### Blikk-staki

At brúka:
Brúkt blikk
Spray

Mannagongd:
Sker lokið av. Sker blikkið í álir nakrar centimetrar niður. Bend teir út. Set ljós í. Ávaring: Ansa væl eftir fingrunum.





6

### Hvítur eingil

**At brúka:**
**Hvítt filt**
**gulltráð**

**Mannagongd:**
**Klipp tveir einglar út. Seyma teir saman við stórum stingum í gulltráði.**